# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Støðast í Føroyum

Tað man vera almenn semja um, at tað er umráðandi at fáa fólk at støðast í Føroyum. Til tess at fáa serstakliga tey ungu at støðast eiga nakrar ávísar fortreytir at vera til staðar. Hetta er ikki bert galdandi fyri Føroyar men fyri øll samfeløg. Altjóðagerð til gott og ilt setur nøkur nýggj krøv til samfelagið, eitt nú tí heimurin við altjóðagerðini alt meira er við at gerast ein arbeiðsmarknaður. Tey mest framkomnu londini gerast vitanarsamfeløg, meðan teir partar av framleiðsluni, ið krevja nógva arbeiðsmegi verða fluttir til sonevnd láglønarlond mst í Asia. Sostatt er einki løgið og heldur einki nýtt í, at altjóðagerðin setur nýggj krøv til okkara samfelag. Hóast vit kanska ikki geva tí so nógv gætur í gerandisdegnum, so eru Føroyar við at broytast frá einum samfelag, sum framleiðir eina rávøru til eitt samfelag, har vinnur við støði í vitan fáa alt meira týdning.

Ein hin fremsta avleiðingin av altjóðagerð er nútímansgerð. Flestøll framkomin lond uppliva eitt sokallað postmoderna tíðarskeið, har so at siga øll mentanarlig, andalig og tjóðskaparlig virði koma undir debatt og spurnartekin verða sett við nógvar gamlar og viðtiknar sannleikar. Hetta er ein orsøkin til, at stórir samfelagsbólkar, ja heilir tjóðflokkar seta seg so hart ímóti altjóðagerðini. Tað er t.d. nógv, sum bendir á, at tann sterkt vaksandi muslimska fundamentalisman er eitt aftursvar og eitt mótrák til altjóðagerð og til tað postmodernaða samfelagið. Henda nýggja støðu hevur elvt til ymsar strategiir hjá flestu stjórnum og altjóða felagsskapum. Øll norðurlond hava globaliseringsætlanir til tess at fáa sum mest burturúr eini samfelagstilgongd, sum er torfør at stýra. Vit fingu Visjón 2015.

Tað er harnæt mestsum sjálvsagt, at okkara samfelag, sum er komið í tilgongdina við altjóðagerð og nútímansgerð, eisini má brynja seg til framtíðina. Ein fortreytin fyri hesum er, at fólk við útbúgvingum støðast í landinum. Tað er tí í tøkum tíma at varpa ljós á hendan spurning og fleiri góðar royndir eru longu gjørdar, royndir, sum vit hava viðgjørt her. Nú er so eisini eitt íkast komið frá Norðuratlantsbólkinum, sum í kvøld í Miðlahúsinum leggur fram frágreiðingina um hví føroyingar búseta seg í Danmark. Hetta verður so uppleggið til ein fund um evnið hvussu fáa vit fólk at støðast í Føroyum Kanningin vísir millum annað, at fólk búseta seg í Danmark, tí tey halda, at fá í útbúgvingartilboð eru í Føroyum, tað eru ov fáar fakligar avbjóðingar, ov lítið fakligt umhvørvið, og tí tey halda føroyska samfelagið vera ov konservativt. Kann og skal nakað gerast við hetta? Og hvat kann gerast? Soleiðis verður spurt. Tað er sjálvsagt bert gott og jaligt, at hesin spuringur støðugt verður umrøddur og fortreytin fyri einum sakligum orðaskifti er vitan um evnið oí Nógv munnu tí síggja fram til hesa spennandi og viðkomandi framløgu. Tað sum verður sagt í kvøld er neyvan síðstu orð ud hetta evnið og fara vit sjálvsagt at fylgja evninum upp í heyst.

**Sosialurin**

## Føroyar reka politiskt fyri vág og vind

KAJ LEO JOHANNESEN



Við einum góðum útgangsstøði við metlágum arbeiðsloysi og einum væl konsolideraðum landskassa hevur hendan samgongan havt allar møguleikar at hildið áfram við at ment landið og givið fólkinum trúgv uppá framtíðina.

Men her er eingin sum stingur út í kortið, her er eingin politisk leiðsla, her eru hóttanir um alt millum himmal og jørð og einki mál fær avleiðingar fyri nakran. Reinir anarkistiskir tilstandir á tingi tað síggja øll sum hava verið innan tinggátt til dømis í gjár tann 8. september 2008. Hvar eru tíðindafólkini? Fyri mær tykist alt at verða kaos.

Samgongupolitikkarar saman við Sjálvstýrinum eru so at siga á einum máli um, at her er heilt galið og siga seg bara bíða eftir, at tað brestir. Hetta kunnu vit ikki borðreiða fyri Føroya fólki og ein rannsakan er neyðug innan føroyskan politikk.

Landið hevur ligið uttan raðfesta fíggjarlóg síðan henda samgongan kom til valdið og nú nakrar fáar dagar áðrenn fíggjarlógin skal leggjast fram frættist, at bert ein fundur hevur verið um eina fíggjarlóg sum í útgangsstøði bert við framskrivingum hevur uml. 380 millióna hall, og er hetta áðrenn nakað stýri hevur raðfest nakran sum helst samgongupolitikk út í kortið.

Vælsignaðu kvinnur og menn í samgongu og sjálvstýri. Tað eru bert tit í løtuni sum kunnu taka róður og árar í hond og skapa okkum eina fíggjarlóg sum veruliga fær fólk at trúgva uppá, at tað ber til. Tað einasta sum krevst er floks- og samgongustev til at fáa fólkið sum her býr at trúgva uppá, at løgtingið kann arbeiða nógv betur enn tann seinast tíðin hevur víst.

## Fleiri krøv og uppgávur – minni tíð til børnini

JARVIN FEILBERG HANSEN



Formaður í Føroya Pedagogfelag

**Tað verður minni tíð til børnini um normeringarnar á dagstovnunum ikki verða munandi betri**

Samfelagið er nógv broytt seinastu árini, og er tørvurin á fakligari vitan innan arbeiði við børnum størri nú enn nakrantíð áður. Staðfestingarnar í PISA kanningini vóru, at føroysk børn eru fakliga illa fyri í mun til børn í øðrum londum. Sjálvandi kunnu nógvir spurningar setast við PISA kanningina, men tó gevur kanningin eina ábending um, at alt er ikki, sum tað skal verða í okkara litla landi.

Dagstovnaøkið hevur ikki havt høga raðfesting, og er hetta møguliga ein av mongu orsøkunum til keðiliga úrslitið. Hyggja vit eftir talinum av útbúnum námsfrøðingum sæst, at umleið 300 námsfrøðingar mangla á dagstovnaøkinum, fyri á ásetingarnar í dagstovnalógini eru fylgdar. Stóri tørvurin á námsfrøðingum ger arbeiðið hjá verandi námsfrøðingum munandi tyngri, tí fakliga vitanin er á so fáum herðum.

Samstundis sum vit vita um stóra trotið á útbúnum fakfólki, eru onnur viðurskifti, ið gera seg galdandi. Síðan Dagstovnalógin kom í gildi í 2000 eru alamt fleiri krøv løgd útá dagstovnaøkið og harvið eisini á námsfrøðingarnar og starvsfólkið, ið starvast har. T.d kann nevnast, at stovnarnir fingu ábyrgd av børnum við serligum tørvi í 2005, menningarætlanir skuldu fremjast í 2006 og í 2009 kemur so aftur krav um námsætlanir. Alt hetta eru viðurskifti, ið seta krøv um eina fakligari vitan. Og við manglandi fakfólkunum er tað sjálsagt, at ábyrgdin í stóran mun kemur at liggja á teimum fáa, sum framvegis tíma at starvast á dagstovnaøkinum.

Til seinastu sáttmálasamráðingar nýtti Føroya pedagogfelag nógva tíð og orku fyri at fáa arbeiðsgevararnar at skilja, at starvsfólkini máttu hava nógv meira tíð at fyrireika tað pedagogiska arbeiðið. Men hetta var ikki nakað, sum fall í góða jørð hjá arbeiðsgevararnum. Hetta er eitt krav, sum limir okkara hava eftirlýst í fleiri ár.

Tað sigur seg sjálvt, at um tú fært fleiri uppgávur, uppgávur ið krevja, at tú ert væl fyrireikaður og hevur eina fakliga vitan, so má meir tíð setast av til at loysa hesar uppgávur. Sum er, hava hesi øktu krøvini IKKI virkað fyri, at starvsfólkið fær betri stundir at loysa uppgávurnar, men bert at tey skulu renna skjótari. Minni tíð verður til børnini – og tað er neyvan ein ynskilig støða. Hetta ber ikki til!

Føroya Pedagogfelag kann ikki liva við, at limirnir fáa fleiri uppgávur, og at tað hvørki sæst aftur á lønini ella á arbeiðstíðini. Námsfrøðingar trívast verri og verri í teirra størvum og um gongdin heldur áfram, sum hon ger í løtuni, kann hetta fáa tær álvarsomu fylgjur, at munandi færri fakfólk starvast á dagstovnaøkinum.

Færri fakfólk merkir, at góðskan gerst verri og tískil fara okkara børn at klára seg verri í framtíðini. Spurningurin er, um kommunurnar eru førar fyri at lyfta ta stóru ábyrgd, sum er, at børn okkara fáa so góða byrjan á lívsleiðini sum møguligt. Tað er ikki peningur sum manglar, men viljin at raðfesta.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.